VIRKSEMISÆTLAN

Nýggja sambýlið á Mýruni 4-6

1. Virksemi

Virksemi fevnir um rakstur av nýggja sambýlinum í Hoyvík til 18 búfólk við menningartarni.
Við hesi verkætlan verður bygt til endamálið og búfólkini fáa sjálvstøðugar íbúðir, har umstøðurnar eru virðiligar og gevur teimum meira privatlív.

Sambýlið fevnir um tríggjar eindir við 6 búfólkum í hvørji eind. Í fyrstu atløgu er ætlanin, at 12 búpláss eru sambýlispláss til borgarar við menningartarni, og 6 búpláss eru roknað sum búfelagsskapur.

2. Ábyrgdari

Trivnaðardepilin setur virksemi í verk, tá sambýlið er klárt at taka í nýtslu.

3. Heimild

§ 32 í forsorgarlógini

4. Kostnaður

Fyritreytir fyri útrokning av rakstrinum

Talan er um tilboð til 18 búfólk.

Lagt er upp fyri at tað verða tríggjar ymiskar eindir, har kostnaðurin er roknaður út frá einum miðal dagsprísi fyri menningartarnað til 12 borgarar í tveimum av eindunum, og 6 pláss eru roknaði út frá einum miðal dagsprísi á einum búfelagsskapi.

Hetta val er grunda á, at tað ikki er avgjørt, hvørji búfólk koma inn í nýggju Mýruna, og normeringin av stovninum er tí torfør at meta um.

Útrokningin er grundað á dagsprísin á niðanfyri nevndu stovnum:	Tal av búfólki	Dagsprísur pr.1.10.20	Rakstur árligt kr.
Sambýlið á Blikagøtu	12	2.082	9.119.160
Búfelagskapur Heygavegur	6	683	1.495.770
Brutto útreiðsla í alt	**18**		**10.614.930**

Fígging

Í upprunalógini frá apríl 2018 varð mett, at byggingin av vardu bústøðunum ikki fór at hava við sær hægri rakstrarútreiðslur og tískil er ikki er neyðugt at seta hægri játtan av til rakstur.

Fortreytirnar eru broyttar síðani tá. Búfólkini, sum áður búði á Mýrini, eru flutt til aðrar bústaðir á Argjum og Tórshavn, herundir bústaðir, sum eru útvegaðir eftir, at lógaruppskotið frá 2018 varð samtykt.
Samlaði talið av bústøðum økist tí við hesum lógaruppskotið, men ilt er í løtuni at meta nágreiniliga um, hvussu nógv raksturin við hesum sambýli fer at økjast.

Roknað við eini húsaleigu á 4.500 kr. pr. mdr., verður leiguinntøkan 972.000 kr., soleiðis at nettuútreiðslan til rakstur av nýggja sambýlinum á Myruni 4-6 verður 9.642.930.

5. Tíðarætlan

Virksemið verður ætlandi sett í verk 2022.

6. Eftirmeting

-

7. Tilvísing til skjøl, journal o.a.

Teldupostur frá Mary í Garði, 29.10.20